# Rull og sjónleikur



Hesi fittu børnini í Útbarnagarðinum á Tvøroyri høvdu verið í Havn hendan dagin og hugt eftir sjónleikinum "Dvørgarnir og snjóhvíta". Onkur av teimum hevði spýð illa á veg suðuraftur, so nú gleddu tey seg øll til nýggi Smyril kemur, tí hann fer nokk ikki at rulla vænta tey. Og tey vóru longu farin at gleða seg

- Vit fara skjótt aftur til Havnar at hyggja eftir "Ronja Ránsmansdóttir", og tá sleppa vit við nýggja Smyrli!, søgdu hesi 22 spentu børnini, sum við ein munn.

Í maskinuni:

# Ein spennandi avbjóðing

Árni Mortensen starvast vanliga sum 2. meistari, men er virkandi maskinsjefur hendan túrin við gamla Smyrli. Hann hevur starvast umborð á skipinum síðani 1975.

Árni leggur áherðslu á, at hesin Smyril hevur roynst ómetaliga væl og hevur verið eitt sera sjógott skip í allar mátar. Hann minnist serliga eina ferð í 1976, tá skipið skuldi í dokk. Óli Hammer var skipari, og ivaðist stórliga í, um teir skuldu fara, tí veðrið var so ringt. Men teir fóru so kortini. Vindurin var rættiliga nógvur, men tá teir nærkaðust havnini í Scrabster, legði skipið seg í bakborð, og sum eitt seglskip sigdi tað uttan trupulleikar inn í havnina.

**Sorgblítt**

Árni heldur tað vera ringt at siga, hvør størsta broytingin við nýggja skipinum verður á hansara starvsøki. Grundprinsippið er altíð á leið tað sama í einum dieselmaskinaríið, sum bæði skipini hava. Kortini væntar Árni, at nógv nýtt verður at seta seg inn í, tá tað ræður um teldustýrda eftirlitið við maskinunum.

- Men eg stúri ikki fyri tí. Eg taki tað sum eina spennandi avbjóðing, sum eitt upplivilsi. Tað er ongin grund til at taka møguligar trupulleikar, áðrenn teir koma. Vit hava verið á skeið, har vit hava fingið innlit í nýggja maskinaríið, og onkur hevur verið við í Spania eftir skipinum, so vit læra av hvørjum øðrum, sigur ein spentur Árni Mortensen, sum tó viðgongur, at tað er við sorgblíndi hann fer at siga gamla Smyrli farvæl.

- Lat okum vóna, at nýggja skipið fer at roynast líka væl sum hetta. So er á góðari leið, smílist Árni.





*Ein tunnil kann ikki viga upp ímóti tí hugnaligu sosialu samveruni umborð á einum skipi, heldur Johan Søren Berg, sum ferðast við Smyrli tríggjar ferðir um vikuna*

# Ringt at finna meir álítandi farleið

Ein av teimum trúgvastu ferðafólkunum við gamla Smyril, man vera Johan Søren Berg á Berg Transport. Johan Søren koyrir frakt, og seinastu sjey árini hevur hann ferðast millum Havnina og Tvøroyri tríggjar ferðir um vikuna, so hann hevur roynt eitt sindur av hvørjum, tá tað ræður um veður og vind. Men skipið má sigast at vera ómetaliga sjógott, heldur hann, tí tað kann teljast á aðrari hondini, hvussu nógvar túrar Smyril hevur avlýst.

- Meir álítandi ferðasamband man verða ringt at finna - sjálvur havi eg heldur ongantíð staðið eftir á keiini øll hesi sjey árini, sigur Johan Søren.

Johan Søren viðgongur, at túrarnir onkuntíð hava verið nakað buldraligir, men tað hevur ikki bilað. - Eg eri gamal sjómaður, og mær dámar væl at sigla, so fyri meg hevur tað fyri tað mesta bara verið hugnaligt, sigur Johan Søren.

Dagarnir hjá Johan Søren blíva ofta langir - hann fer frá húsum klokkan seks á morgni og er ikki heima aftur fyrr enn um tíggju tíðina á kvøldi, so á veg norð aftur leggur hann seg ofta at sova.

- Jú, eg havi fingið mangan góðan blundin umborð á Smyrli, sigur Johan Søren, sum heldur ikki hevur kent tað sum tíðarspillu at verða noyddur at ferðast góðar tveir tímar aftur og fram tríggjar ferðir um vikuna.

– Man hevur jú onki annað val, so tú kanst líka so gott fáa tað besta burturúr tíð. Manningin er so sera fyrikomandi, og tað liggur altíð væl fyri at fáa eitt hugnaligt prát við onkran. Øll tosa bara um tunlar nú, og teir hava uttan iva eisini sínar fyrimunir. Men tá tað ræður um sosialu samveruna, formáa tunlarnir sær lítið afturímóti skipunum, sigur Johan Søren avgjørdur.

*Tað verður munandi lættari hjá Páll Vestergaard og hinum trimum dekkarnum at fáa puslispælið á dekkinum at liggja, sum tað skal, umborð á nýggja Smyrli.*

